# Pottatáttur

Heilsubót fyri so mangt nú øll leita,
antin tað so er stórt ella smátt.
Í staðin á heilsuhjálpara heita
avgjørdi eg at keypa mær pott.

2. Giktin hon bilaði, ryggurin hokin
mist hevði alla megi og mátt.
Nú hann so rættur sum var hann strokin,
tí at eg javnan leypi í pott.

3. Alskins ítrótt, strembing og stunan
tey klóku siga vera so gott.
Hjá mær í longdini best man muna
at seta meg afturá í mín pott.

4. Fartelefonir, sjónvørp og teldur
eg legði av at brúka so brátt.
Eingin óvani lokkar meg heldur,
um eg seti meg í mín pott.

5. Sum yngri so víða eg plagdi at streyla,
konan so mangan fall í fátt.
Eftir mær longur hon ei nýtist geyla,
hon hyggur bara í mín pott.

6. Fyrr helt konan, eg ei var nóg alskin,
kendi seg gloymda hvørja nátt.
Nú vit sum nýgift, um eg eri treiskin
at minnast til at leypa í pott.

7. Bindiklubbar og grannakonur,
– sjálvt um vit ei sita væl um sátt –
um meg, sum var eg kongasonur,
allar fylkjast at leypa í pott.

8. Um heim okkar' tykist, tá vit fáa vitjan,
ov skirvið at bjóða teim inn um gátt.
Í túninum beina tey niður í hitan,
vit seta okkum øll í pott.

9. Ei øl millum vinmenn eg plagi at spara,
vit drekka til ta stummu nátt.
Ikki á vesi vit tíma at fara,
vit brúka allir sama pott.

10. Fyri gull ella grønar skógir,
farleið til Soria Moria Slott,
fínar rættir, um teir tykjast góðir,
eg býti ikki fyri mín pott.

11. Alt tað, sum fólk munnu hátíðarhalda,
Merkið tey vinda í húnan hátt.
Størri meining, - ja fleirifalda -
mær gevur at seta meg í mín pott.

12. Um eg eri av landi skotin
fjart handan víða havið so blátt,
av longsli nøtrandi hjartabrotin
at sleppa aftur í mín pott.

13. Verði á ellisheim eg koyrdur
– øllum tað verður til há og spott –
um eg krevji og ei verði hoyrdur,
at atgongd eg vil hava til mín pott.

14. Tá eg eri farin, í eystan man hyggja
– tó eg veit, at eg fái tátt –
eg ikki í nakrari kistu vil liggja.
Vælsignaði, latið meg brúka mín pott!

Lagið er Fruntatáttur; triðja og fjórðar verða tiknar umaftur sum niðurlag. Um táttin, sum er frá 2018, sigur yrkjarin: “At fáa sær pott í dag tykist, sum tá ið øll fingu sær sjónvarp í áttati-árunum. At kalla øll skuldu hava hetta nýggja tólið at røkka sær næstan ævigari sælu, og alt annað bleiv sett til viks.” jd.